VÍSUNDAVØKA

Greinin er partur av lýsingarherferð, sum Granskingarráðið stendur fyri

# FRÁ ROYKSTOVU TIL SAMRØÐUKØK

Køkurin er okkara mest sosiala rúm í húsinum. Tað er í smarta samrøðukøkinum, at vit brúka mest tíð, og tað er køkin, vit vilja sýna fram, tá fólk kemur á gátt. Køkurin var eisini tað rúmið, sum varð mest brúkt fyri 100 árum síðani, hóast fermetrarnir vóru teir somu ella færri, enn teir eru í dag. Jóan Pauli Joensen granskar í føroyska húsinum í fyrsta parti av 20. øld

ORÐ: EILEN ANTHONIUSSEN

Undir heitinum »Í stovuni sofu, í køki komfýr« heldur Jóan Pauli Joensen fyrilestrar undir Vísindavøkuni. Fyrilestrarnir eru úr tilfari, sum hann hevur granskað í í sambandi við gomlu føroysku húsini, og sum eftir ætlan skal gevast út í bók, tá hann er liðugur við granskingararbeiðið. Hóast hann er farin frá sum undirvísari og professari á Søgu- og Samfelagsdeildini, er hann ikki givin við at arbeiða. Gransking er ein so stórur partur av hansara lívi, at hann heilt einfalt ikki kann lata vera við at granska.

– Hetta er eitt evnið, sum eg havi fingist við alt lívið. Gjøgnum tíðina havi eg arbeitt við ymiskum verkætlanum innan mentan, og tað er serliga hetta evnið, sum snýr seg um, hvussu fólk liva og búgva, og hvussu tey innrætta seg, sum hevur mín áhuga. Tí havi eg kastað meg yvir hesa granskingina av føroyska húsinum, sum veksur fram stutt eftir ár 1900.

Húsið, ið granskingin hjá Jóan Paula Joensen snýr seg um, eru tey hús, sum vóru vanlig eftir ár 1900. Grundsniðið er eitt hús í trimum hæddum við køki, lítlum spísikamari ella kova, tveimum stovum, gongd ella forstovu og lítlum gestakamari í miðhæddini. Á loftinum er gongd og trý kømur, oftast eitt stórt og tvey minni. Í kjallaranum var ofta verkstaður, høsnarhús, básar til neyt og seyð.

> »
> *At ganga upp í heimið og innrætting er trúgv hjá summum, líka sum onnur hava aðrar sannføringar og ganga upp í ítrótt, kost ella okkurt triðja. Innrættingin hjá fólki fyllir sera nógv í dag*
>
> *Jóan Pauli Joensen*

### Roykstovan fær nýtt navn

– Miðhæddin var næstan altíð tann sama, men tey fínaru og størru húsini høvdu trimpil og kvist, sum gjørdi tað møguligt at hava fleiri rúmlig kømur á loftinum. Nógv av hesum húsunum síggjast enn í dag, eitt nú verður skipararekkjan í Porkeri ofta nevnd.

Jóan Pauli greiðir frá, at hetta húsið kemur til Føroya fyrst í 1900-talinum, møguliga úr Noregi ella Danmark. Tey líkjast nógvum av teimum húsunum, ið vit síggja í okkara grannalondum.

– Søguliga hava vit bara havt tvey húsasløg, áðrenn vit fara undir at byggja hesi húsini. Víkingahúsið frá miðøld og so gomlu føroysku húsini við roykstovu og glasstovu frá 16-1700-talinum. Hetta nýggja húsið kom um ár 1900, og tað nýggja við hesum húsinum var, at tað hevði bæði loft og kjallara. Íblásturin kom úr grannalondunum og í takt við, at tann borgarligi lívsháttурin vann fram. Tað hevur onki við tað politiska at gera, men heldur meinast tað við, at tá fólkið flytir av bygd og inn í býin, broytist lívsstílurin eisini. Tá verður húsið karmur um familjulívið á ein annan hátt, enn man kendi tað frammanundan.

Við nýggja húsinum broytir roykstovan í teimum gomlu húsunum navn til køk, tá hon fær køk, loft og innlagt vatn. Hóast báðar stovurnar, fína stovan og spísistovan, fylla helvtina av miðhæddini, brúkti man bert køkin sum uppihaldsrúm. Tað kundi vera trongt, tí ofta búðu trý ættarlið undir somu lon.

– Men tá spældu børnini meir úti. Og tey spældu kanska uppi á loftinum ella í rúmi, sum enn ikki var innrættað, kjallarin kundi eisini nýtast, men í høvuðsheitum var køkurin einasta rúmið, sum var í brúk í tí dagliga. Tíðirnar vóru øðrvísi tá. Maðurin var forsyrgjarin og arbeiddi antin úti ella í kjallaranum, so køkurin var arbeiðsplássið hjá konuni.

### Húsið umboðar títt lív

Samfelagsliga gongdin og sosialu broytingarnar avspegla sostatt týðiliga, hvussu vit hava innrættað okkum heima. Konan átti køkin og matgerðina, og maðurin átti kjallaran. Loyvdu umstøðurnar tí, fekk maðurin sítt harraverilsi, um talan var um rík og múgvandi fólk. Í teimum gomlu húsunum við roykstovu og glasstovu var vanliga eisini eitt prestakamar í endanum. Har var eisini ein serlig inngongd, eisini rópt bakdyr.

Tað stuttliga við hesum nýggju húsunum, sum komu eftir 1900, er, at øll líkjast. Og hetta avspeglar ein lívshátt sum kemur uttanífrá, har húsið eisini umboðaði ein serligan lívshátt.

– Tú kemur inn í húsini gjøgnum forstovu, heldur fram haðani inn í fínu stovu og haðani inn í spísistovuna. Fínir gestir nýttust ongantíð at koma inn í køkin, har maturin varð gjørdur, og har húsfólkið og onnur kundu verða í frið.

Stovurnar vóru so at siga slett ikki í brúk, uttan til tær heilt serligu løturnar og til høgtíðirnar. Við tíðini fer man at brúka spísistovuna meir, serliga sunnudagar. Tá útvarpslurtini blivu vanlig, stóðu tey ofta í stovuni, og so fóru fólki aftaná, men við hurðini opnari inn í køkin, har tey eisini sótu. Upp aftur seinni kom sjónvarpið, og so við og við fór man at brúka stovurnar meira. Summi tóku veggin niður og fingu eina størri stovu í staðin fyri tvær smáar.

– Húsini vóru hitað við torvi og seinni koli, og mann oyslaði ikki við hitanum. Komfýrurin, sum kom í hesi húsini frá fyrsta degi, var í køkinum, og tí hevur tað verið heitt og fjálgt at sitið har.

### Kumma í skotinum

Frá 1950 árunum kemur ein nýggjur stílur, og tá vit koma upp í 1960 árini verður tað fínari og fínari, og tá byrjar fólkið eisini at bróta frá í innrættingini, sum vit eisini kunnu knýta upp í rákið, ið eyðmerkti nýggju fríu tíðina.

– Men so langt eri eg ikki komin enn. Tað, sum eg haldi vera serliga áhugavert við hesum tíðarskeiðinum, sum er fyrra helvt av farnu øld, er hvussu týðiligt tað er, at meginparturin av fólkinum ber seg at á sama hátt. Øll gera líka burtursæð frá onkrum lítlum fráviki

# TOVU TIL ØK



**Tað, sum er serliga áhugavert fyri meg, er, hvussu eins fólk bera seg at. Tann fólksliga mentanin er so sterk. Man innrættaði seg eftir tí, ein hevði brúk fyri, og tað skuldi vera líka, sum grannin hevði.**

í innrættingini.

Hyggur man nærri at tekningunum er onki vesi at finna á miðhæddini ella loftinum. Men í lítlum skoti í kjallaranum stendur ein bukka.

–Vesið, sum vit kenna tað í dag, verður ikki partur av innrættingini fyrr enn fyrst í 1960 árunum, kanska fyrr hjá onkrum og seinni hjá øðrum. Skuldi man vaska sær, mátti man hava eitt fat inni á kamarinum ella vaska sær í køkinum.

Soleiðis var vanligi føroyski bústaðurin fyrst í 20. øld, og soleiðis vóru flest hús í Føroyum innrættað, alt eftir status og førimuni.

– Fert tú út í smábygdirnar í dag, síggjast nógv av hesum húsum enn. H. C. W. Tórgarð bygdi nøkur øðrvísi hús her í Havnini í 1930 árunum, men annars var tað hesin stílurin, sum var ráðandi.

## Fólk elta, sum fyri er slóða

Jóan Pauli greiðir frá, hvussu alt frá gardinum fyri vindeyguni til súltutoy ella gele aftur við tí stokta sunnudagskjøtinum hongur saman, tá man hyggur eftir innrættingini av húsum frá hesum tíðarskeiðinum.

– Tað, sum er serliga áhugavert fyri meg, er, hvussu eins fólk bera seg at. Tann fólksliga mentanin er so sterk. Man innrættaði seg eftir tí, ein hevði brúk fyri, og tað skuldi vera líka, sum grannin hevði. Gamaní var tað stættarmunur, men tað sæst eisini týðiliga, hvussu trendurin hjá fína fólkinum seyrar niður gjøgnum samfelagsløgini. Tú sært, hvussu borðið er dekkað, at gardinur, sósaskál og reyðkál hoyra saman. Tað er ikki av tilvild.

Føroyar vóru í broytingartíð hetta tíðarskeiðið, serliga í 1920-30 árunum. Gamla bygdarmentanin víkir spakuliga fyri tí borgarligu mentanini, sum kom inn í landið og vísti seg greiðast í teimum stóru bygdunum, serliga í Havn og á Tvøroyri, har nógv handilslív var. Og tað merkti, at fólk fóru at seta sær onnur krøv til heimið eisini.

– Eitt nú fóru gentur til tær stóru bygdirnar sum fiskagentur, har tær sóu so nógv, sum tær ikki vóru vanar við heimanífrá. Eitt var, at tær arbeiddu í fiski og komu saman við øðrum fiskagentum og fiskimonnum, men tær hugsaðu eisini um framtíðina og spardu upp til eina kommodu, seymimaskinu og útstýr til at klára eitt familjulív. Tað var ein dreymur um tað góða lívið, sum mann vildi hava sum karm um tilveruna, sum myndaði samfelagið um hesa tíðina.

Pengar skuldu til, og møblar vóru dýrir at skaffa. Fína stovan skuldi hava sofu, kanska plysssofu, stólar og borð og spísistovan spísiborð við fínum stólum – í øllum førum pinnastólum.

– Idealið hjá øllum, eisini tí arbeiðandi fólkinum, var í »stovuni sofu, í køki komfýr«. Tá hevði tú alt tað, sum tú kundi ynskja tær.

## Lívið er ein pallur

Nógv er broytt hesi 100 árini – og tó. Børn og vaksin vóru saman á ein annan hátt. Tey búðu tættari saman og svóvu ofta fleiri í sama kamari og í somu song. Í dag tíma børnini ikki at sita so nógv saman við teimum vaksnu, men brúka mest tíð í egnum kamari, serliga tá tey gerast eitt sindur eldri. Hóast nógvar barnafamiljur í dag búgva í húsum av hesum gamla slagnum, verða tey brúkt nógv øðrvísi enn fyrr. Tað eru neyvan nógvar stovur, ið standa til pynt í dag. Blaðar tú í einum nýmótans blaði um hús og innrætting, kanst tú síðu upp og síðu niður lesa og síggja myndir av, hvussu eitt nýmótans heim skal síggja út. Og hvat er mest umráðandi enn samrøðukøkurin, sum eisini í Føroyum er vorðið til eitt hugtak hjá mongum?

– Nú eru køkur og stova saman, og køkurin er fínur nú og er einki at goyma burtur. Køkurin er umboðandi fyri tín lívsstíl. Hús í heila tikið eru dreymar um familjulív, sum fyri nógv er fyrst og fremst í høvdinum. Vit droyma um fínar køkar, at gera góðan og sunnan mat har, men tey flestu arbeiða allan dagin, so løturnar eru ikki so nógvar, tá man stendur og hugnar sær í samrøðukøkinum.

Taka vit fatur aftur í kynsleiklutirnar, hevur maðurin í summum førum eisini fingið eitt pláss í køkinum, tí nú sleppur maðurin eisini er at vísa, hvat hann dugir, meðan gestirnir hugna sær runt um køksoynna, sum ofta stendur har, ið skilaveggurin inn til stovuna fyrr var.

– At ganga upp í heimið og innrætting er trúgv hjá summum, líka sum onnur hava aðrar sannføringar og ganga upp í ítrótt, kost ella okkurt triðja. Innrættingin hjá fólki fyllir sera nógv í dag. Beint nú síggja vit, hvussu alt, ið fyrr hekk saman, upployst aftur við at man setur blandað gamalt stell á borðið; ymiskar tallerkar og koppar, sum man eitt nú sær á matstovuni Barbaru. Tað er alt samalt eitt slag av nýggjari pallsetan. Lívið er ein pallur og senan ella tað 'kulturella programmið' skiftir eitt sindur, men menniskja broytist ikki - hon leitar altíð eftir onkrum.

## VÍSINDA-VØKAN 2016

Greinin er skrivað í sambandi við ársins **Vísindavøku**, sum verður í Perluni og Reinsarínum í Tórsgøtu í Tórshavn. Vísindavøkan verður **fríggjadagin 30. september** frá kl. 8.00 á morgni til á leið kl. 22.30 á kvøldi.

Ymsar framsýningar og **samvirkin tiltøk** vera í Perluni og á Torginum.

Hesi verða skipað kring frumevnini **eld, luft, vatn og jørð**. Her verður alt møguligt **frá fiski til dronur** at síggja, hoyra um, smakka og nerta við.

Framløgur, sum serliga eru ætlaðar miðnámsskúlanæmingum, verða í Reinsarínum fyrrapartin.

Lærarar og næmingar úr Hoydølum fara at hava ymiskt á skránni **til børn** í einum telti á p-økinum yvirav Reinsarínum.

Steðgur verður millum kl. 15.00 og 17.30, tá **Arkitekturdagarnir**, sum Arkitektafelag Føroya skipar fyri, verða settir.

Frá kl. 17.30 til 19.30 verða tiltøk um og við íblástri frá **Pokemon GO**. Stuttar framløgur, tiltøk og undirhald.

Frá kl. 20.00 verður hugnakvøld við framløgum og undirhaldi.

Vísindavøkan verður eisini á ferð kring alt landið við fyrilestrum í døgunum **19.-29. september**. Fleiri enn **50 fyrilestrar** eru á skránni.

Tað eru granskingarstovnarnir og Granskingarráðið, sum skipa fyri. Øll tiltøkini eru **ókeypis**. Sí skránna og les meira á gransking.fo og á **Facebook-síðuni hjá Granskingarráðnum**.

## Um verkætlanina:

**Eftir ætlan skal tilfarið um føroyska húsið samlast í bókaútgávu. Jóan Pauli Joensen hevur starvast fyrst á Føroya Fornminnissavni í meira enn fimtan ár og síðani á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya í eini 30 ár. Tá hann fór frá fyrr í ár, hevði hann í samanlagt fimtan ár røkt starvið sum rektari á Fróðskaparsetri Føroya.**